# Eitt ára fongsul fyri grovan harðskap

**Fyrr í ár vóru tveir føroyingar í Hanstholm bukaðir og skornir í andlitið. Fríggjadagin var 33 ára gamli gerningsmaðurin dømdur eitt ár handan rimar fyri óvanliga grova harðskapin**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Tann 16. mai í ár vórðu tveir føroyingar í Hanstholm úti fyri óvanliga ógvusligum harðskapi, tá ein 33 ára gamal maður bukaði teir av og skar teir í andlitið við eini fløsku. So ógvusligt var tað, at annar teirra var ógvuliga nær við at missa sjónina í vinstra eyga, umframt at teir báðir fingu fleiri brot í andlitið og eisini brutu nøkur rivjaben. Ein triðji maður - ein 61 ára gamal dani - varð eisini álopin og sligin í høvdið við eini fløsku.

Fríggjadagin í farnu viku fall dómur í málinum. Álopsmaðurin fekk eitt ár handan rimar. Sjálvur segði hann seg ikki minnast nógv frá hendingini í einum raðhúsum á Bygmarken í Hanstholm, tí hann hevði drukkið eina rúgvu av øl og brennivín. Heldur ikki hinir tríggir álopnu menninir minstust tað stóra frá hendingini, sum Thisted Dagblad, ið eisini skrivar um tilburðin, lýsir sum eitt "drikkelag en majeftermiddag". Men fleiri vitni í grannalagnum til raðhúsini, har annar av føroyingunum búði, vistu at siga frá nógvum gangi úr húsunum, sum 33 ára gamli maðurin seinni kom gangandi úr innsmurdur í blóð.

Talan er um treytaleysa fongsulsrevsing, og hetta verður grundað á, at maðurin áður er dømdur fyri harðskap.

33 ára gamli maðurin valdi at taka við dóminum, men vildi ikki góðtaka at varðhaldsfongslingin varð longd til hann skal inn at sita, og tí kærdi hann henda partin av dóminum.

Føroyingarnir eru báðir í fimmtiárunum.

**Vælveru-fyritøka til sølu**

FØROYABANKI

Fyritøkan er ein væl rikin og búgvin "wellness"-fyritøka í Havn. Fyritøkan er á altjóða støði og fevnir í høvuðsheitum um alt innan vakurleikarøkt, spa og hárfríðkan, umframt umboð og sølu av vørum innan hetta økið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Føroya Banki**
Corporate Finance
Húsagøta 3
100 Tórshavn
Tlf. 330 330

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



**MÁLSVIÐGERI til Veitingardeildina**

Hevur tú hug at royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning? So er hetta møguliga nakað fyri teg. Eitt fulltíðarstarv og eitt avloysarastarv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni er leyst at seta til 1. november 2007, ella skjótast gjørligt.

**Arbeiðs- og ábyrdarøki**
- Pensiónsmál – útrokning, áseting og ávísing
- Dagpengamál – viðgerð, avgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Forskotsrindan av barnapeningi, viðgerð, avgerð, áseting og ávísing
- Uppihaldspeningur – viðgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Gera upp fíggjarliga partin, tá mál ganga út
- Krøv til arbeiðsgevarar
- Aðrar uppgávur

**Útbúgving**
- Skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving
- Starvsfólkið skal luttaka á útbúgvingartiltøkum hjá Almannastovuni

**Arbeiðsroyndir / førleikakrøv**
- Arbeiðsroyndir innan almenna umsiting ella líknandi starvsroyndir er ein fyrimunur
- Er fleksibul og hevur góð samarbeiðsevnir
- Evni og vilja til at arbeiða saman við øðrum toymum og miðstøðum
- Evni at hava yvirlit við at arbeiða við fleiri uppgávum í senn
- Hava góð evni at umstilla seg tá broytingar henda
- Góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- Hollan kunnleika til KT

**Um deildina**
Á deildini starvast 9 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari. Av tí at talan er um eitt arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, má tann ið sett/-ur verður tola broytingar í starvsinnihaldinum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarbólki 3.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tummas Djurhuus, deildarleiðari á tel 35 35 10, ella á fartelefon 21 54 76.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til Almannastovuna Smyrilsvegur 20, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.

í seinasta lagi Týsdagin 25. september 2007. Vinarliga merkið brævbjálvan: "Veitingardeildin".

KREA.FO